

# Hvussu væl kennir tú Bíbliuna?

## Jólakapping fyri børn upp til 17 ár

Nú jólini standa fyri durum, fara vit á Sosialinum undir eina kapping við spurningum til børn og ung upp til 17 ár um mangt og hvat í Gamla og Nýggja Testamenti.

Vit byrja í dag hósdag 4. desember við sjey spurningum. Teir skulu øll tit, ið vilja vera við í kappingini, klippa út, svara, skriva navn, bústað, tel. og aldur á, og goyma. Tað sama skulu tit gera við spurningarnar, vit hava til tykkara í hvørjum Sosiali til og við mikudag 17. desember, tá kappingin endar.

Allir spurningarnir í kappingini eru ikki líka léttir at svara. Tá kunnu tit til dømis fara í bíbliusøgurnar, tit lesa ella hava lisið í skúlanum at finna svarini. Ella hví ikki spyrja tey tilkomnu í húsinum! Í telduni ber eisini til at leita eftir svarum.

Leparnar, tit hava klipt út og goymt *(við spurningum, svarum, navnið, bústaði, tel. og aldri)* skulu tit senda Sosialinum í seinasta lagi leygardagin 20. desember. Í brævbjálvanum til okkara skal sama navn standa á øllum lepum. Uttaná skal standa "Jólakapping 2003", navn á luttakara og bústaður. Tit, ið tá hava sent allar lepar inn og svarað rætt, verða við í lutakasti um fýra virðisløntir.

Við vón um undirtøku frá hópin av børnum og ungum um alt Føroya land, ynskja vit øllum ein góðan jólamánað.

HESTPRENT - TEL. 314 555

VINNINGAR:

**1. Vinningur:**

## Vikuskiftisferð fyri tvey til Íslands

ATLANTIC AIRWAYS



*Blue Lagoon*




## Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

*Spurningar úr Gamla og Nýggja testamenti*

| Spurningar | Tykkara svar |
|---|---|
| **36** Ein av kendu profetunum var millum teirra, sum vóðu flutt í útlegd, eftir at Jerusalem var tikin og templið brent. Hann var einaferð tveittur í eitt løvuhelli, men løvurnar gjørdu honum einki. Hvussu æt | : |
| **37** Eftir 70 ár í útlegd fingu jødarnir loyvi frá einum nýggjum kongi at fara heimaftur, men verri enn so allir fóru. Ein, sum var eftir, æt Mordokai. Hann vildi ikki boyggja seg fyri boðum frá kongi, og hevði fosturdóttir hansara ikki verið, høvdu allir jødar í landinum verið týndir tá. Hvussu æt hon? | : |
| **38** Ein ríkan og gudrøknan mann gav Gud illamanni loyvi at freista fyri harvið at royna hansara gudstrúgv og tol. Hvussu æt maðurin? | : |
| **39** Fýra elevangeliir eru í Nýggja Testamenti. Í hvørjum av teimum finna vit tekstin, sum vit kalla jólaevangellið? | : |
| **40** Í Nýggja Testamenti hoyra vit um prestin Sakarias, sum ein eingil vísti seg fyri og segði, at kona hansara skuldi eiga ein son og eisini, hvussu hann skuldi eita. Hvat var navnið? | : |
| **41** Eingilin, sum hevði boðað Sakariasi frá, at kona hansara Elisabeth skuldi fáa ein son, kom eisini til Mariu moy við boðum um, at hon skuldi eiga Jesus. Hvussu æt eingilin? | : |
| **42** Hvussu æt keisarin, sum ráddi í stóra rómverska ríkinum, tá ið Jesus varð føddur? | : |

| | |
|---|---|
| ***Navn á luttakara:*** | *Bústaður:* |
| ***Telefon:*** | *Aldur:* |

At klippa út og goyma, til kappingin endar 20. desember. Seinasta freist at senda Sosialin allar útkliptu leparnar við spurningum og svarum, navni á luttakara, bústaði, tel. og aldri, er leygardagin 20. desember. Uttan á brævbjálvanum skal standa Jólakapping 2003, umfram navn á luttakara og bústaður. Minnist til, at allir lepar í brævbjálvanum frá hvørjum einstøkum luttakara, skulu hava sama navn.

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801



# Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistarnir til løgtingsvalið tann 20. januar 2004 liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð frá fríggjadegnum 12. desember 2003 til hósdagin 18. desember 2003.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 22. desember 2003.

RUNAVÍKAR KOMMUNA

*8. desember 2003*
**Runavíkar býráð**

# Kunngerð

Við hesum verður gjørt kunnugt, at vallistarnir til løgtingsvalið tann 20. januar 2004 fyri valdømini í Skála Kommunu, liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni á Skála og í handlinum hjá Elspu Jacobsen í Skálafirði, frá fríggjadegnum 12. desember 2003 til hósdagin 18. desember 2003.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 22. desember 2003.

**Skála kommuna**

# Vága Javnaðarfelag

## Uppstillingarfundur

1. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður **í húsunum hjá Miðvágs Arbeiðarafelag hóskvøldið 11. desember kl. 20.00.**

Øll javnaðaráhugað eru vælkomin.

**Vága Javnaðarfelag**

# Hondlesing í Tórshavn

## millum jóla og nýggjárs

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Vinarliga ring og bið um tíð á
**tlf. 0045 39664880** aftaná kl. 16.00

# Avloysari fyri hjálparfólk

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir avloysara fyri hjálparfólk (fulltíðarstarv) til Frítíðarskúlan, at byrja skjótast til ber, og til 1. mars 2004.

Umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi skjótast til ber.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran fyri Dagstovnin, Jónu E. Jacobsen, á tlf. 421760.

**Kvívíkar kommuna**
FO-340 Kvívík

# Listalærari á Háskúlanum

Søkt verður eftir lærara í

**Tekning og Málningalist**

10 tímar um vikuna fyrra hálvárið 2004.

Áhugað venda sær til:

***Føroya Fólkaháskúli***
***Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn***
***Telefon 311743 - Telefax 319687***
***ffh@skulin.fo - www.skulin.fo/ffh***

# Norðoya Javnaðarfelag

Fyrsti uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður hóskvøldið 11. desember kl. 20.00 á loftinum í Skálanum.

**Nevndin**

# Hagafundur

Hagastýrið »fyri Sunna í Haraldsundi« boðar hervið til hagafund í skúlanum í Haraldsundi tann 29. desember 2003 kl. 19.00

**Skrá** Roknskapur
Val
Ymiskt

**Stýrið**

# Uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum

Sambært § 12, stk. 3 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum.

Fastur formaður skal veljast á aðalfundi felagsins í februar 2004. Uppstillingin skal verða liðug innan 15. januar 2004.

Uppstillað verður á tann hátt, at boðað verður skrivstovu felagsins skrivliga frá, at limur sjálvur ynskir at stilla upp, ella at limur ella limir ynskja at stilla annan lim upp. Stillar limur ella stilla limir annan lim upp enn seg sjálvan, skal samtykki valevnisins fylgja við uppstillingarfráboðanini.

Tann skrivliga frásøgnin um uppstilling skal verða skrivstovu felagsins í hendi ikki seinni enn 15. januar 2004. Í frásøgnini skal verða tilskilað navn og bústaður hjá valevninum, og hvar valevni arbeiðir.

Formansstarvið er lønt, og bert tann, sum tekur starvið upp sum fulltíðarstarv burturav, kann verða valdur. Sambært sáttmálan hevur tann, sum verður vald/ur til formann í felagnum rætt til at fáa farloyvi frá arbeiðsplássinum alla formanstíðina, soleiðis at stovnurin hevur skyldu til at hava starv til hana/hansara, tá formanstíðin er úti.

Aðalfundurin velur formannin beinleiðis við vanligum meiriluta.

Limir verða, í seinasta lagi tá aðalfundurin verður lýstur, kunnaðir um, hvørji formansvalevni verða at velja ímillum á aðalfundinum.

Víst verður annars sum heild til § 12 í felagslógini.

Fráboðanir um uppstilling verða at senda til

STARVSMANNAFELAGIÐ
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn**

# Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistarnir til løgtingsvalið tann 20. januar 2004 liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá kl. 9.00 til kl. 15.00 frá fríggjadegnum 12. desember 2003 til hósdagin 18. desember 2003.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi 22. desember 2003.

*8. desember 2003*
**Oyndarfjarðar bygdarráð**